FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 12. november 2024
J. nr.: 24/25268-2
Viðgjørt: DH

Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-048/2024 frá Honnu Jensen, løgtingskvinnu, settur landsstýriskvinnuni í fíggjarmálaum, Ruth Vang, um leiguinntøkur skattast í kommunu, har húsið stendur.

Spyrjari: Hanna Jensen, løgtingskvinna

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Leiguinntøkur skattast í kommunu, har húsið stendur

Spurningar:

1. Verður arbeitt við at gera lóggávu, sum tryggjar, at skattur av húsaleigu fer til ta kommununa, har húsið er stendur?
2. Um ja, hvussu verður skipanin væntandi sett saman?
3. Um ja, hvussu gongur við málinum, og nær kann væntast at lógaruppskot kemur í Løgtingið?

Spurningur 1

Í dag er skipanin soleiðis, at tá ið talan er um bruttohúsaleigu, so fer kommunuparturin av skattinum altíð til kommununa, har ognin er.

Tá ið talan er um uppgerð av húsaleigu við roknskapi, so má borgarin siga TAKS frá, at ognin ikki er í bústaðarkommununi, til dømis við at upplýsa matrikul nummar. Um hetta verður upplýst, so hevur TAKS møguleika at tryggja, at skatturin fer til atvinnukommununa.

Fíggjarmálaráðið arbeiðir í løtuni við lóggávu, sum tryggjar, at skatturin av húsaleigu fer til kommununa, har húsið stendur (atvinnukommununa).

Spurningur 2
Sambært galdandi lóggávu, verður skatturin frá húsaleigu, sum er gjørdur upp eftir bruttoskipanini, býttur millum atvinnukommununa og landið.

45% fer til atvinnukommununa og 55% fer til landskassan.

Er talan um uppgerð av húsaleigu eftir roknskapi, kann atvinnukommunan fáa kommunuskattin av tí inntøkuni.

Ætlanin er, at skatturin av húsaleigu frameftir fer 100% til atvinnukommununa.

Spurningur 3
Uppskotið, sum er í gerð, snýr seg bæði um landtíðarleigu og stuttíðarleigu, men enn er ov tíðliga at siga, hvussu endaliga uppskotið verður skipað.

Lógaruppskotið verður eftir ætlan lagt fyri Løgtingið á vári 2025.

Tinganes, 12. novembur 2024

Ruth Vang
landsstýriskvinna í fíggjarmálum